## Oljuvinnan dálka minni

Danski orku- og veðurlagsráðharrin, Connie Hedegaard, vil hava oljufeløgini í Norðsjónum at avmarka orkunýtsluna á pallunum. Tað er í samsvari við eina nýggju orkuavtalu í Fólkatinginum, men tað samsvarar eisini væl við politikkin hjá eitt nú Mærsk Olie og Gas. Har sigur Anders Würtzen, varastjóri, at oljufeløgini vilja sjálvandi selja sum mest av gassinum heldur enn at brúka tað sum brennievni í sambandi við framleiðsluna.



## Arktiskur politikarafundur

Teir báðar seinastu dagarnar hava politikarar úr teimum arktisku økjunum hildið fund í býnum Rovaniemi har norðuri í Finnlandi. Høvuðsevnið á fundinum vóru livikorini hjá upprunafólkinum í teimum arktisku økjunum, og hvussu veðurlagsbroytingarnar fara at ávirka kor teirra. Grønlendska fólkatingskvinnan Juliane Henningsen, sum hevur verið í Rovaniemi, sigur við KNR, at nógv vísindafólk royna at kanna, hvussu livikorini verða broytt.

# List skal gera børn forvitin

**List skal ikki uppala børn til nakað ávíst. Heldur skal listin gera børnini forvitin eftir øðrum enn bara teirra egna heimi, staðfesti Poulina Poulsen, myndlistalærari, á norðurlendskum fundi í gjár um list og mentan í skúlum**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens K. Vang*

Henni dámar ikki orðið 'uppaling' tá talan er um, hvussu list og skúli kunnu hava gleði hvør av øðrum. Heldur tosar Poulina Poulsen, myndlistalærari, um 'dannilsi' í hesum sambandi.

- List kann gera næmingarnar forvitnar eftir øðrum enn júst teirra egna heimi. Eisini børnini uppliva, hvussu listin kann flyta tey inn í eina aðra dimensión og fáa tey at hugsa eitt sindur øðrvísi, sigur Poulina Poulsen, tá hon verður spurd, hvønn leiklut list eigur at hava innan skúlagátt.

### Egnað list

Høvið er ein norðurlendskur fundur um list og mentan í skúlunum, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum í gjár. Í okkara grannalonum eru tey komin rættiliga langt í hesum arbeiði, men eisini í Føroyum er okkurt við at henda. Mentamálaráðið er longu við í fleiri átøkum, ið sum frá líður skulu stimbra leiklutin hjá list í skúlahøpi. Millum hesi er royndarverkætlanin Listaleypurin, ið miðar móti at geva fólkaskúlanæmingum í øllum landinum høvi at uppliva góða føroyska yrkislist.

- Okkara fremsta uppgáva er at tryggja, at listarligu tilboðini, sum Listaleypurin bjóðar, eru egnaði til at at vísa á skúlum. Ikki soleiðis at skilja, at vit fara at blanda okkum í innihaldið sum so, men listafólkini skulu hava gjørt sær greitt, hvat tey ætla við verkinum í skúlahøpi, sigur Poulina Poulsen, sum er limur í úrvalsbólkinum hjá Listaleypinum.

### Listaskálin lukkað land

Poulina er ikki í iva, tá hon verður spurd, hví tað er so umráðandi at børn fáa atgongd til list longu í barnaskúlanum

- Tað kann vónandi verða við til, at list verður ein nátúrligur partur av lívinum hjá føroyskum børnum, so list og mentan ikki seinni verða nakað fremmant og hámentanarligt, sum fær tey at bakka í hurðini, sigur Poulina Poulsen.

Hon dylur ikki yvir, at hon heldur tað vera ómetaliga spell, at eitt nú Listaskálin so at siga er lukkað land fyri føroysk børn. Ikki tí, ongin forðar teimum í at koma inn, men onki verður gjørt fyri at lata dyrnar upp fyri teimum við eitt nú verkstøðum fyri børn.

- Vit mangla í allarstørstan mun ein listapedagog, sum kundi tikið sær av slíkum uppgávum, sigur Poulina Poulsen, og leggur áherðslu á, hvussu stóran týdning tað hevur at lata børnini verða partur av listarligum upplivingum.




*- Børn skulu eisini sleppa at uppliva, hvussu eitt listaverk veruliga kann flyta okkurt í menniskjum, staðfesti Poulina Poulsen, myndlistalærari, á norðurlendskum fundi í gjár um skúlabørn og list*

### Norskar royndir

Júst hetta hava tey gjørt nógv burturúr í Norra, har teirra útgáva av listaleypinum hevur virkað væl í fleiri ár. Hetta greiddi Kristin Risan, leiðari fyri norðurnorskt kunscenter í Solvær, millum annað frá á fundinum.

- Vit hava lagt áherðslu á, at listafólkini ikki bara tosa um og vísa síni listaverk, men taka børnini við í listarliga arbeiðið. Tað er rættiliga týðiligt, at hesi børnini hugsa øðrvísi um list, eftir at tey sjálvi hava verið partur av tilgongdini. Tá er listaverkið ikki longur bara eitt deytt ting, man kann hyggja uppá, segði Kristin Risen.

Hon legið afturat, at eitt av endamálunum við verkætlanini, hon er partur av í norðurnorra, er at stimbra hugin hjá børnunum sjálvi at skapa list og gera sær sínar egnu hugsanir um list sum heild.

### Ongir peikifingar

Á fundinum nýtti Poulina Poulsen høvið at greiða frá, fakinum 'Evning', ið er tað øki, har listarligt arbeiðið er savnað á skúlunum sum er.

- Fyrst av øllum er tað avgerandi, at lærarin í eitt nú myndlist, hevur okkurt uppá hjarta við teimum ymsu evnunum, sum verða tikin upp. Her hevur tað serliga týdning, at teknikkur og innihald ganga hond í hond, so alt ikki bara druknar í teknikki og tilvild, vísti Poulina Poulsen á.

Hon legði afturat, at endamálið við endamálið við at taka list inn um skúlagátt ikki nýtist at vera annað enn at geva børnunum eina øðrvísi estetiska uppliving.

- Júst hvør tann upplivingin er, er torført at seta orð. Tey skulu kanska bara sleppa at uppliva, hvussu tað kennist, tá listin veruliga rykkir okkurt í teimum, tí tann upplivingin avmarkar seg avgjørt ikki bara til tey vaksnu, sigur Poulina Poulsen.

Tí dámar henni heldur ikki tankan um, at list í skúlanum skal hava ein ávísan uppalandi leiklut.

- Um so er, mugu vit eisini svara spurninginum, hvat tað er, listin skal uppala til. Tá kann endamálið skjótt gerast ein lyftur peikifingur, og so er lítið vunnið, sigur Poulina Poulsen.

### Kanningar: Børn og list

Mentamálaráðið er farið undir at orða ein mentanarpolitikk fyri børn og ung í aldrinum 0-18 ár.

Í hesum sambandi verða tvær kanningar gjørdar í løtuni:
Skráseting av, hvørji frítíðartilboð føroyskar kommunur hava til børn og ung
Spurnarkanning millum børn og ung um tørvin á mentanartilboðum

Visjónin handan mentanarpolitikkin er, at øllum børn og ung í Føroyum skulu sleppa at taka lut í mennandi og skapandi virksemi. Eisini skulu tey hava atgongd til fjølbroyttar mentanarligar upplivingar.